Beinir Johannesen
vegna Fólkaflokkin

Bárður á Steig Nielsen
vegna Sambandsflokkin

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Øktur barnafrádráttur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 10. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður "kr. 9.200" broytt til: "kr. 11.200", og "kr. 6.500" verður broytt til: "kr. 8.000".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2023.

Almennar viðmerkingar
Seinasta tíðin hevur verið sera nógv merkt av príshækkingum, og hevur tað gjørt fíggjarstøðuna hjá mongum familjum sperda. Príshækkingar koma sum steinur omaná byrðu hjá barnafamiljum, ið frammanundan eru merktar av fíggjarstøðuni. Tískil er tað alneyðugt, at vit geva barnafamiljum ein fíggjarligan lætta.

Tí verður skotið upp at hækka barnafrádráttin við 2.000 kr. um árið fyri børn undir skúlaaldur og 1.500 kr. um árið fyri børn frá 7 til 17 ár. Uppskotið fær virknað frá 1.januar 2023, so tað er galdandi fyri alt árið.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Fíggjarligar avleiðingar:
Uppskotið verður mett at kosta landskassanum einar 23 mió. kr. í mistum inntøkum. Tó kann væntast, at nettoútreiðslurnar verða lægri, tí nýtslan økist.

Umsitingarligar avleiðingar:
Uppskotið hevur ikki nógvar umsitingarligar avleiðingar, av tí tað bert eru smáar broytingar.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Nr.1
Barnafrádrátturin hækkar úr kr. 9.200 til kr. 11.200, og úr kr. 6.500 til kr. 8.000.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 7. mars 2023

Beinir Johannesen Bárður á Steig Nielsen